# Bókanýtt

*Lagt til rættis: Dorit Hansen*

# Tvær forkunnugar bøkur um Bíbliuna frá Fróðskapi







Tvær sera ymiskar og forkunnugar bøkur, sum vísindaliga viðgera Bíbliuna, hvussu hon er komin til og hvussu hon er týdd og tulkað ígjøgnum øldir. Talan er um bókina „Føroyskar bíbliutýðingar og týðingarroyndir“ hjá Elsu Funding, gudfrøðingi, sum Turið Sigurðardóttir hevur ritstjórnað, og um bókina „Guds orð ella orð um Gud. Tekstur og søga í Bíbliuni“ hjá Hans Andriasi Sølvará, søgufrøðingi.

### Føroyskar bíbliutýðingar

Elsa Funding er fyrsta føroyska kvinnan, ið gjørdist prestur. Bókin Føroyskar bíbliutýðingar og týðingarroyndir er kanning hennara av føroyskum týðingum av bíbliuteksti frá byrjanini í 1823 og fram til 1990.

Viðgerðin er tvíbýtt: tíðin fram til 1908 og tíðin 1909-1990. Týðararnir í tí fyrra skeiðinum eru slóðbrótarin Schrøter og teir Hammershaimb, Jóan Petur uppi í Trøð, Fr. Petersen, Jógvan Poulsen, Símun av Skarði og A. C. Evensen. Í hesum skeiðinum varð støðið lagt. Í seinna skeiðinum eru tey trý høvuðsnøvnini Jákup Dahl, sum fram um aðrar skapti føroyskt bíbliumál; Victor Danielsen, ið týddi alla Bíbliuna; og K.O. Viderø, sum týddi Gamla Testamenti. Teir yngstu týðararnir eru Axel Tórgarð og Hans J. Joensen.

Høvundurin leggur fyri við vandaligari gjøgnumgongd av vesturlendskum bíbliutýðingum søguliga og ástøðiliga. Hetta er fangandi lesnaður hjá øllum, ið hava áhuga fyri tulkingarfrøði (hermeneutikki) og týðingarfrøði.

### Orð um Gud

Hans Andrias Sølvará, søgufrøðingur, hevur skrivað bók, har hann varpar ljós á nakað av tí, sum kritiska bíbliugranskingin er komin eftir.

Bókin snýr seg um tann varðveitta bíbilska tekstin og í minni mun um tann søguliga veruleika, sum fjalir seg aftanfyri tekstirnar. Víst verður m.a. á, at tekstirnir í Bíbliuni aloftast eru skrivaðir av ónevndum høvundum langt aftan á eftir tær hendingar, sum teir snúgva seg um. At tað ofta er trupult at fáa innihaldið í tekstum í Gamla Testamenti at samsvara við fornfrøðiligar kanningar.

Víst verður eisini á, at einki upprunahandrit finst av nøkrum teksti í Bíbliuni. Og at tekstirnir í Nýggja Testamenti eru varðveittir í so nógvum og ymiskum handritum, at granskarar í veruleikanum ikki vita, hvussu nógvir munir eru millum tey. Høvundurin vísir í bókini á hópin av dømum um, at seinni kristnir avritarar hava broytt, lagt afturella broytt tekstirnar av gudfrøðiligum grundum.

Ætlanin við bókini er at geva eitt íkast til aktuella føroyska kjakið um leiklutin hjá Bíbliuni og kristindóminum í føroyska samfelagnum. Hetta er onnur bókin hjá Hans Andriasi Sølvará, sum Fróðskapur gevur út í ár. Í mars kom út Adressumálið. Donsk-føroysk viðurskifti undir fyrra heimsbardaga.




Marine Harvest er størsta alifelag í heiminum, og verður triði hvør aldur laksur framleiddur í einum Marine Harvest felag. Í Føroyum rekur Marine Harvest 4 alibrúk og eina smoltstøð, og framleiða vit 6.000 tons av laksi um árið.

**Skrivstovufólk til Marine Harvest Faroes P/F**

Virksemi okkara økist, og tí søkja vit eftir skrivstovufólki til eitt áhugavert og fjølbroytt starv.

Tú kemur at arbeiða við øllum vanligum skrivstovuuppgávum, so sum at fakturera, bókað og avstemma, lønaravgreiðsla.

Vit vænta okkum, at tú hevur royndir í skrivstovuyrkinum, teldukunnleika til vanligu office forritini, dugir enskt, hevur samstarvsevni og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

Starvið verður at seta skjótast til ber. Løn sambært avtalu.

Ynskjast fleiri upplýsingar, ber til at ringja til Páll Larsen, tlf. 777076

Umsóknir skulu verða okkum í hendi seinast 14. desember 2007 kl. 16.00

Umsókn við prógvum o.ø. skulu sendast til

Marine Harvest Faroes P/F
Ternubrekkan 1
695 Hellurnar

Ella sum teldupostur til pall@marineharvest.fo

www.marineharvest.com

marineharvest excellence in seafood



1. klassa Cateringsservice



Vit gera alt: heitar rættir, kaldar rættir, buffét, fleiri rættirs menu, canapéir, siðbundið og ikki siðbundið.

- jólaborðhald
- føðingardagar
- konfirmatiónir
- familjuveitslur
- bindiklubbar
- hugnaløtur

Ring til á tlf. 454100 ella tlf. 257448 og fá eitt tilboð.
evagun@hotmail.com

matarlist